Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Kristianna Winther Poulsen, løgtingskvinna

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum

Evni: Hækkan av ansingarsamsýning

Spurningar:

1. Hevur landsstýriskvinnan ætlanir um at hækka ansingarsamsýningina fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima?
2. Um ja, hvussu nógv er ætlanin at hækka samsýningina?
3. Um ja, nær verður hendan broyting sett í verk?
4. Hevur landsstýriskvinnan ætlanir um at leggja heimildina at áseta upphædd fyri ansingarsamsýning til kommunurnar at umsita?

Viðmerkingar:
Eldri, sum búgva heima, og sum hava tørv á støðugari røkt og hjáveru, kunnu verða ansað í egnum heimi av persóni, sum fær samsýning fyri hesa uppgávu. Skipanin kom í gildi í 1984 og er frá einari tíð, tá ið so at siga eingin onnur tænasta enn heimahjálp var innan eldrarøkt. Samsýningin er 10.789 kr. um mánaðin, og upphædin er ikki broytt, síðani eldraøkið gjørdist kommunalt. Kommunurnar hava víst á, at tørvur er á at hækka ansingarsamsýningina. Tað er landsstýriskvinnan við almannamálum, sum ásetir upphæddina, og kommunurnar taka avgerð um at veita hesa tænastu, umframt at tær rinda fyri tænastuna.

Í stóru eftirmetingini av eldraøkinum frá 2021 eru tilsamans 15 tilmæli um neyðugar broytingar fyri at fáa eitt betur virkandi eldraøki. Eitt av teimum 15 tilmælunum snýr seg um ansingarsamsýning. Har verður ført fram, at upphæddin eigur at verða broytt, og at vit eiga at umrøða, um heimildin at áseta upphæddina fyri ansingarsamsýning kann verða løgd út til kommunurnar.

Talið av teimum, sum fáa samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima, hevur verið fallandi tey seinastu árini. Í 2012 fingu 113 persónar ansingarsamsýning, og talið í dag er umleið 60 persónar. Ein broyting í upphæddini kundi møguliga gjørt tað, at fleiri tóku av møguleikanum og valdu at vera um tey, sum tey varða av, heima.

Eldraøkið varð lagt út til kommunurnar at umsita í 2015. Høvuðsendamálini við at leggja økið til kommunurnar vóru at minka um frástøðuna millum myndugleikan og borgaran og fáa eitt greiðari ábyrgdarbýti. Frástøðan er minkað, men enn er ábyrgdarbýtið á fleiri økjum ikki blivið greiðari. So her er framvegis eitt stórt og týdningarmikið arbeiði at gera.

Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýriskvinnuni í almannamálum.

Á Løgtingi, 6. mars 2025

Kristianna Winther Poulsen